# Síðsta skot fyri inntakinum



Nú er liðugt at spreingja fyri inntakinum, og um tríggjar vikur ella so verður fyrsta skotið til sjálvan norðoyatunnilin latið av

**Nú byrjar at líkjast uppi í Borðoyarvík, har dúgliga hevur verið arbeitt við inntakinum til norðoyatunnilin. Síðsta skotið er latið av, og fyrsta skotið til sjálvan tunnilin verður latið av um hálvan apríl**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Klaksvík: Hósdagin var liðugt at spreingja fyri inntakinum til norðoyatunnilin, og nú verður arbeitt við at gera arbeiðsøkið hjá Føroya Konsortium við bátahylin liðugt. Tað fer komandi vika at ganga við.

Síðani kann sjálvt tunnilsarbeiðið byrja. Júst nær tað fyrsta skotið verður latið av, er ikki endaliga dagfest, men Dávur Reinert Hansen, stjóri í Norðoyatunlinum sigur, at tað verður um hálvan apríl.

Júst tá Sosialurin kemur framvið Borðoyarvík, er klárt at lata tað seinasta skotið av. Ein av arbeiðsmonnunum har, greiðir frá, at arbeiðið hevur gingið væl, hóast tað varð nakað tarnað av kava og vátveðri í byrjanini. Men síðani tað viðraði betur, hevur gingið skjótt.

Tað var eitt øgiligt arbeiði at fáa alla moldina vekk, og um man tekur hana við, so er talan um eini 20.000 rúmmetrar, sum eru sprongdir og grivnir burtur á økinum.

– Nú fara vit skjótt í holt við tunnilin sjálvan, so nú byrjar at líkjast, siga teir á økinum.

Hinumegin verður arbeitt við fullari megi. Teir eru komnir einar 460 metrar, og alt gongur væl. Dávur Reinert Hansen sigur, at teir lata væl at tilfarinum, sum teir arbeiða við.

– Við inntakinum og fyrsta skotinum til sjálvan tunnilin byrjar hetta sjálvandi at gerast meiri ítøkiligt fyri norðoyingar, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í Pf Norðoyatunlinum.

### Ferðslan órógvar

At norðoyingar eru spentir upp á tunnilin, er ongin ivi um. Nógvir bilar koyra framvið, og fólk fregnast at vita, hvussu gongur. Hetta bilar vanliga ikki nógv, men tað órógvar sera nógv, tá teir spreingja.

– Vit mugu hyggja øll hugsandi støð at vita, um fólk stendur nakrastaðni, tá vit sprongja, og ferðslan kann eisini órógva nakað tá, men sum heild er bara heilt í lagi, sigur ein av NCC monnunum á økinum.

Hann fer og stillar sín bil tvørtur um vegin, so at ferðsla ikki kann sleppa framvið. Tað er vanliga ikki vandi á ferð, tá sprongt verður, men teir taka ikki nakrar kjansir, og tí verða fólk biðin um at halda seg vekk, tá sprongt verður.

Men hóast tað koma nakrir bilar heilt nær. Tann eini bilførarin spyr, um hann ikki kann sleppa framvið. Hann hevur ørindi við bátahylin. Hann sleppur so, tann næsti vendir og koyrir burtur frá økinum, meðan tann triði fer aftaná tí fyrsta uttan at steðga.

– Hvar fer hasin, spyr NCC maðurin og sigur suffandi, at hetta er strævið, meðan hann fer rennandi aftaná bilinum fyri at steðga honum.








# Sambandsfólk vænta lívligan landsfund

**Sambandsfók vænta nógv fólk á landsfundin, sum verður í Læraraskúlahøllini um vikuskiftið. Lagt er upp til lívligt orðaskifti, sigur fráfarandi formaðurin**

POLITIKKUR
*Edvard Joensen*

Lagt er upp til lívligt orðaskifti á landsfundi Sambandsfloksins, sum verður um vikuskiftið. Politisku hendingarnar síðan valið fara uttan iva at seta sín dám á landsfundin, væntar fráfarandi formaðurin.

Alfred Olsen fráfarandi formaður í Sambandsflokkinum, væntar, at nógv fólk kemur á landsfund hjá flokkinum um vikuskiftið.

Fundurin byrjar fríggjakvøldið klokkan 19.00. Tá verður tann meira umsitingarligi parturin av fundinum avgreiddur. So sum val av formanni, næstformanni og grannskoðara, eins og onnur slík mál, sum hava beinleiðis við aðalfund at gera, verða løgd fram og avgreidd.

Tað er greitt, at einki beinleiðis formansval verður á hesum fundinum, tí bara eitt valevni er. Tíðarfreistin fyri uppstilling er farin, og bara Kaj Leo Johannesen er uppstillaður. Sostatt verður hann valdur við lógvabrestum, sigr Alfred Olsen, sum ikki væntar, at nakar fer at verða beinleiðis í móti valinum av nýggja formanninum

Leygardagin verður landsfundurin tikin upp aftur klokkan 10.00 fyrrapartin. Tá fer formaðurin - tað er nývaldi formaðurin - at koma við frágreiðing síni til landsfundin. Eisini fara landsstýrismenn Sambandsfloksins, Báður Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, og Bjørn Kalsø, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, at siga fundinum frá teirra virkisøki.

Seinnapartin verður almenna orðaskifti, og Alfred Olsen væntar, at politiska støðan, sum verið hevur síðan løgtingsvalið, og ikki minst i samband við skiftið av landsstýrismanni við fiskivinnumálum, fer at seta sín dám á orðaskiftið á fundinum. Tað er alment kent, at fleiri sambandsfólk, kanska serliga sunnaneftir, eru ikki heilt nøgd við gongdina, sum var, tá landsstýrismaðurin varð skiftur út.

Landsfundurin endar við, at næstformaðurin í danska Vinstraflokkinum, Lars Løkke Rasmussen, fer at halda røðu fyri sambandsfólki á landsfundi í Læraraskúlahøllini í Havn.



*Kaj Leo Johannesen er einasta valevni til formanssessin í Sambandsflokkinum. Hann verður væntandi valdur við lógvabrestum á landsfundinum um vikuskiftið*

Fíggjarmálaráðharrin:

# - Øll sparitiltøk eru framd

**Fíggjarmálaráðharrin Bárður Nielsen sigur, at sparitiltøk eru framd á fíggjarlógin 2004 á hvørjari konto hjá hvørjum landsstýrismanni, og frá á einum halli á í fyrstu syftu 400 milliónir megnaðu teir at koma niður á 277 milliónir**

FÍGGJARLÓGIN 2004
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Seinnapartin hósdagin varð fíggjarlógin 2004 løgd fram í Fíggjarmálaráðnum, og sum kunnugt er talan um eitt hall á 277 milliónir krónur, sum als ikki er ein vanlig støða í føroyska búskapinum.

Bárður Nielsen hevur bæði í bløðunum og loftmiðlunum gjørt vart við, at orsøkin til hallið er ein skeiv búskaparstýring frá undanfarnu fullveldissamgongu, har almennu útreiðslurnar eru hækkaðar við einari milliard, meðan inntøkurnar orsakað av fallandi fiskaprísum og kreppu í alivinnuni er lækkaðar.



*- Hóast landskassin nú ikki fær somu inntøkur gjøgnum skatt, setir skattalættin ferð á búskapin, og tað er m.a. vegurin fram, segði nýklakti fíggjarmálaráðharrin m.a. á tíðindafundi í Fíggjarmálaráðnum hósdagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Allround sparingar

Meðan Herman Oskarsson aðrastaðni í blaðnum vísir á, at útreiðsluvøksturin er náttúrliga avleiðingin av løgtingssamtyktum tíðliga í 90´unum, og Høgni Hoydal vísir á vantandi vilja til sparingar, sigur Bárður Nielsen, at øll tiltøk eru sett í verk.

– Uttan at taka nakað ítøkiligt øki framum annað hevur talan verið um allround sparingar á øllum kontum hjá øllum landsstýrismonnum, sigur fíggjarmálaráðharrin.

Spurdur, hví tiltøk ikki eru sett í verk at breiðka um inntøkugrundarlagið, er Bárður Nielsen avgjørdur.

– Tað er ímóti okkara hugsjón og politikki at áleggja meiri skatt á borgaran, sum Tjóðveldið skjýtur upp við avgjøldum á vørur, sigur Bárður Nielsen. Hinvegin tvíheldur samgongan um skattalættan, sum sambært Bárði Nielsen er ein týdningarmikil liður at venda búskapargongdini.

- Hóast landskassin nú ikki fær somu inntøkur gjøgnum skatt, setir skattalættin ferð á búskapin, og tað er m.a. vegurin fram, sigur nýklakti fíggjarmálaráðharrin úr Sambandsflokkinum.

### Framtíðarætlanir

Á tíðindafundinum vísti Bárður Nielsen eisini á, at vinnupolitisk tiltøk skulu setast í verk at venda gongdini, t.d. á granskingar- og útbúgvingarøkinum. Skattalættar skulu fremjast, útreiðslur landskassans skulu stýrast strangari, bygnaðarbroytingar verða í almennu fyrisitingini, og stovnar verða álagdir at kortleggja sínar mannagongdir, um fíggjarligu karmarnir ikki verða hildnir.



*Kommunala íløguloftið eigur at verða tikið av, so kommunurnar sleppa at seta fleiri nýggj arbeiði í gongd fyri á tann hátt at geva búskapinum eitt skump rætta vegin, sigur Alfred Olsen*

# Kommunala íløguloftið má takast av

**Íløguloftið hjá kommununum má takast av, so vit tann vegin fáa gongd á búskapin aftur, sigur fráfarandi formaður Sambandfloksins í viðmerkingum til fíggjarlógaruppskotið, sum lagt er fram**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Búskapurin má fáa eitt skump fyri at knógva rætta vegin aftur. Tað kann millum annað gerast við at taka burtur íløguloftið hjá kommununum, sigur hann.

Verður íløguloftið avtikið, so kommunurnar fáa møguleika fyri at seta størri arbeiði í gongd, fer tað at hjálpa upp á búskapin og fáa hann at kvinka rætta vegin aftur, sigur Alfred Olsen.

Hann er tó greiður yvir, at ikki allar kommunurnar eru so væl fyri, at tær kunnu gera nakað stórvegis beinanveg. Men nógvar kommunur hava tann møguleikan, vísir hann á.

Hann fýlist annars á, at hallið á fíggjarlógini er ov stórt, men ber í sama andadrátti í bøtuflaka fyri partamannin, sum legði hana fram.

– Har var eingin tíð at geva av fyri at fáa rætta meira upp á hasi tølini, sigur Alfred Olsen.

Men næstu ferð verður betri, væntar hann. Nú verður farið undir at gera nýggja fíggjarlóg fyri næsta ár, og tá skal hallið burtur.

Inntøkurnar skulu hækka, sigur Alfred Olsen, og útreiðslurnar skulu haldast niðri.

Hann ásannar, at neyðugt er við ávísum útreiðslum, sum ikki slepst undan. Men haldast má aftur onkunstaðni kortini. Og inntøkurnar ætlar hann ikki at fáa frá øktum skattum og avgjøldum.

– Nei, vit skulu framleiða okkum størri inntøkur, sigur hann. Bæði við at seta fleiri arbeiði í gongd og við at menna okkara útflutning meira. Stutt og greitt at fáa meira fyri fiskin, vit útflyta, sigur hann.

Tað kann gerast við at arbeiða meira her heima, áðrenn útflutt verður, sigur hann. Vit eiga at finna nichur og selja feskt. Tí at kappast við frystum fiski klára vit neyvan, heldur Alfred Olsen.